# Fimm ár á Guantánamo



**Hósdagin 11. januar 2007 eru fimm ár liðin síðani Guantánamo-fangalegan á Kuba varð tikin í brúk. Amnesty heitir í hesum sambandi á fólk um at senda heilsanir til fangarnar, sum kunnu birta nýggja vón og eisini gera myndugleikarnar varugar við, at áhugi er fyri fangunum og fyri at mannarættindi verða vird**

AMNESTY
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Síðani 2002 hava tilsamans 775 fangar verið afturhildnir á Guantánamo. Í løtuni sita umleið 430 fangar úr 35 ymiskum londum í fangaleguni uttan ákæru ella dóm.

Amnesty International arbeiðir fyri at fangarnir á Guantánamo verða settir fyri ein vanligan dómstól samsvarandi øllum altjóða standardum, uttan at deyðadómur verður nýttur.

– Um hetta ikki verður gjørt eiga teir at verða leyslatnir beinanvegin, sigur Amnesty.

Tí heitir Amnesty á fólk um at senda nýggjársheilsanir til fangarnar. Heilsanirnar kunnu birta nýggja vón og eisini gera myndugleikarnar varugar við, at áhugi er fyri fangunum og fyri at mannarættindi verða vird – eisini á Guantánamo.

Fimm fangar hava fingið loyvi at fáa post uttanífrá og Amnesty heitir í hesum sambandi á fólk um at senda stuðulsheilsanir til fangarnar.

– Heilsanirnar kunna birta nýggja vón í einari svárari tíð og somuleiðis gera myndugleikarnar varugar við altjóða áhugan fyri fangunum, sigur felagsskapurin.

Menninir, hvørs søga verður søgd á heimasíðuni hjá Amnesty og prentað her í blaðnum í vikuni, hava brúk fyri tínum stuðli. Amnesty heitir á fólk um at senda teimum eina heilsu – eina áminning um, at teir ikki eru gloymdir.

Vit endurgeva her søguna um Sami al-Hajj, sum stendur at lesa á www.amnesty.fo

# Sami al-Hajj




**Sami al-Hajj er bukaður, er hildin vakin í fleiri samdøgur, báðar knæskálirnar eru knústar og hann hevur somuleiðis verið fyri kynsligum yvirgangi**

Sami al-Hajj er 35 ára gamal og sudannesiskur ríkisborgari. Hann starvaðist á arabisku sjónvarpsstøðini al-Jazeera, tá hann varð handtikin.

Sami al-Hajj fór í desember 2001 úr Pakistan til Afghanistan í arbeiðsørindum fyri Al-Jazeera, í sambandi við at nýggja stjórnin í Afganistan fór til verka. Men áðrenn hann og starvsfelagarnir komu til markið steðgaði pakistanska løgreglan teimum, har Sami - sum tann einasti - varð handtikin. Hann varð fongslaður í Pakistan og 7. januar 2002 var hann latin amerikanarunum og fongslaður í Afganistan.

Í juni 2002 var Sami fluttur á Guantánamo. CIA hevur alla tíðina roynt at fingið Sami at viðgingið, at har er samband millum Al-Jazeera og al-Qaeda.

Sami er píndur ógvusliga bæði áðrenn, undir og eftir avhoyringarnar. Hann er bukaður, er hildin vakin í fleiri samdøgur, báðar knæskálirnar eru knústar og hann hevur somuleiðis verið fyri kynsligum yvirgangi. Sami hevur í longri tíð verið í hungursverkfalli við tí endamáli at bøta um viðurskiftini, harímillum at fáa atgongd til læknahjálp og heilivág. Hann hevur fleiri ferðir roynt at tikið lívið av sær. Amnesty óttast, at hetta fer at eydnast honum áðrenn hann fær eitt rættvíst rættarmál.

***Um tú ynskir at senda eina heilsan til Sami al-Hajj:***

**Skriva til:**
**Sami al-Hajj**
**ISN 345Camp Delta**
**PO Box 160**
**WashingtonDC 20053**
**USA**

**Týdningarmikið at hava í huga, tá kort verða send:**

- Send einfaldar heilsanir, helst á upprunamálinum ella á enskum.
- Send ikki politiskar ella átrúnaðarligar heilsanir – einfaldar heilsanir, sum bera boð um samkenslu eru nóg mikið.
- Send kort uttan trúarligar ella jólaligar myndir.
- Nýt ikki Amnesty kort og nevn ikki Amnesty International.
- Bið ikki um aftursvar, men skriva navn og bústað á postkortið. So kann viðkomandi avgera um hann svarar tínum brævi.
- Merk brævbjálvan "Airmail" og set eitt 10 kr. frímerki á.
- Seinasta freist at senda kort er 28. februar 2007.

Vinarliga send Amnesty eitt avrit, um tú fært nakað svar.